Fróðskaparsetur Føroya

3. februar 2010

# Fundarfrágreiðing frá fundi í bygnaðarbólkinum 2/2010

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Mánadagur 25. januar 2010 kl. 13.00 – 15.00 |
| Fundarstað: | Føroya Læraraskúli |
| Til staðar: | Súsanna Mortensen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Rúna Hjelm, Randi Durhuus, Jóannes Hansen og Hanna Horn. |
| Ikki til staðar: | Kári á Rógvi, Birgit Fredriksberg og Anni Djurhuus. |

Vit byrjaðu fundin við at gjøgnumganga punktini í arbeiðssetinginum fyri bygnaðartilgongdini fyri at kanna eftir, hvussu langt vit eru komin í arbeiðinum.

Arbeiðssetningur – grein fyri grein:

1. Definera og skipa megindeildirnar á setrinum, millum annað kanna møguleikan fyri at deildirnar kunnu verða færri í tali enn nú (smb. § 16).
2. Definera arbeiðsuppgávurnar og heimildirnar hjá dekanunum (smb. § 15).
3. Definera akademisk, fyrisitingarlig og tøknilig størv so starvsinnihaldið verður greitt og dynamiskt.
4. Økja um møguleikar fyri tvørgangandi gransking í samstarvi við aðrar føroyskar stovnar.
5. Seta karmar fyri skipan av lestrarráð og uppgávum tess (smb. § 17).
6. Seta karmar fyri skipan av akademiskum ráð og uppgávum tess (smb. § 18).
7. Starvsfólkapolitikkur/Samstarvsráð.
8. Seta upp karmar fyri samskifti innanhýsis og uttanhýsis.
9. Seta karmar fyri umsiting av fíggjarviðurskiftum, harundir menning av undirstøðukervinum og inntøkukeldum afturat almennu fíggingini.

## 1. Definera og skipa megindeildirnar á setrinum, millum annað kanna møguleikan fyri at deildirnar kunnu verða færri í tali enn nú (smb. § 16)

Vit hava ikki enn diskuterað bygnaðarbroytingar á Setrinum, men hava kortlagt hvussu bygnaðurin á Setrinum og funksjónirnar eru í dag. Á fundinum var nomið við, um tað skulu verða færri deildir á Setrinum enn tað eru í dag. Men málið má verða ein bygnaður, sum verður fakliga og funktionelt optimalur. Tað varð hildið vera umráðandi, at um deildir skulu leggjast saman, eiga tílíkar avgerðir at verða fakliga grundaðar. Mett varð, at tað er týðiligt ein áhugi fyri samstarvi tvørtur um deildir, bæði á útbúgvingar- og granskingarøkinum. Tað er ein ávísur ótti fyri, at útbúgvingar fara at verða útstykkjaðar á fleiri fakultet, nakað sum hevur verið ein óheppin gongd fyri millum annað læraraútbúgvingina í Svøríki.

Kundi verið áhugavert at kannað, um tað er hóskandi at innføra funksjónina við útbúgvingarleiðarum á deildunum eins og tað er í dag á skúlunum á Setrinum. Deildirnar


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

hava meiri royndir við at brúka óformellar ábyrgdarlærarar at skipa fyri útbúgvingunum á deildunum. Ábyrgdarlærararnir hava ábyrgd av, at skeiðið koyrir, t.d. skulu teir fáa fatur á og samskifta við leysalærarar. Adjungeraðir lærarar hava til uppgávu at finna bókmentir, dagføra listar og finna leysalærarar á sínum fakøkjum. Eisini hava teir sum ábyrgd at tryggja, at fakliga útbúgvingarstøðið er nóg høgt.

**2. Definera arbeiðsuppgávurnar og heimildirnar hjá dekanunum (smb. § 15)**
Henda uppgávan er loyst.

**3. Definera akademisk, fyrisitingarlig og tøknilig størv so starvsinnihaldið verður greitt og dynamiskt**
Tey flestu fyrisitingarligu og tøkniligi størvini eru definerað, tó er tørvur á at definera fakligu fyrisitingina á deildunum og skúlunum, hetta eru størv so sum ábyrgdarlærarar, toymisleiðarar, útbúgvingarleiðar, fakligir samskiparar og útbúgvingarleiðarar. Á komandi fundi verða hesar funksjónir lýstar. Somuleiðis skulu eisini laborantstørv og granskingarhjálparar lýsast. Eftir er eisini at definera akademisk størv ella vísindastørv á deildunum. Í sambandi við hetta arbeiðið skulu vit á einum av komandi fundunum í bygnaðarbólkinum viðgera eitt uppskot frá Jóan Paula Joensen, rektara, um akademisk størv á Fróðskaparsetrinum.

**4. Økja um møguleikar fyri tvørgangandi gransking í samstarvi við aðrar føroyskar stovnar**
Mett var ikki, at hetta skal vera partur av arbeiðinum í bygnaðarbólkinum, men heldur ein partur av strategiarbeiðinum á deildunum.

**5. Seta karmar fyri skipan av lestrarráð og uppgávum tess (smb. § 17)**
Flutt til komandi fund.

**6. Seta karmar fyri skipan av akademiskum ráð og uppgávum tess (smb. § 18)**
Flutt til komandi fund.

**7. Starvsfólkapolitikkur/Samstarvsráð**
Súsanna Mortensen kunnaði um, at Sjúkrarøktarfrøðiskúlin arbeiðir við einum uppskoti til starvsfólkapolitikk. Avgjørt varð, at Súsanna og Rúna arbeiða víðari við hesum uppskoti og leggja tað fram fyri bygnaðarbólkin sum eitt uppskot um starvsfólkapolitikk fyri alt Setrið.

**8. Seta upp karmar fyri samskifti innanhýsis og uttanhýsis**
Semja var um, at tørvur er á at endurskoða samskiftisreglugerð og somuleiðis at menna samskiftisamboð fyri lesandi og starvsfólk á Setrinum.

**9. Seta karmar fyri umsiting av fíggjarviðurskiftum, harundir menning av undirstøðukervinum og inntøkukeldum afturat almennu fíggingini**
Rúna Hjelm kunnaði um, at tað á fíggjarøkinum millum annað er tørvur á:

- at fáa meiri gjøgnumskygni/skjalfesting av undirvísing og gransking á Setrinum
- at setanarviðurskiftini verða gjøgnumgingin og løgd til SSS
- at fáa eina innanvirkisfíggjarætlan fyri deildirnar á Setrinum
- at fáa innført mál- og avriksstýring fyri Setrið
- at menna og fáa greiðar reglur fyri inntøkufíggjað virksemi á Setrinum

Fíggjarøkið verður tikið upp til viðgerðar á ein av komandi fundum og fíggjarleiðarin, Hugin Skaalum verður við á hesum fundinum.

Á fundinum varð eisini hugtakið *Granskingargrundað undirvísing* vent. Semja var um, at hetta hugtakið millum annað inniber, at lærararnir skulu granska innan eitt ávíst fakøki.

Semja var um, at hetta hugtakið millum annað inniber, at lærararnir skulu granska innan eitt ávíst fakøki. Í granskingargrundaðum útbúgvingum byggja evnini á gransking, og undirvísing verður givin av fólki, sum hava gransking sum part av sínum arbeiði. Tørvur er á, at lærarar á FLSK og SRFS koma í gongd við at menna granskaraførleikarnar. Somuleiðis er tað tørvur á at menna teir pedagogisku førleikarnar á deildunum á Fróðskaparsetrinum.

Av tí at tíð var ikki til viðgerðina av málunum á skránni, vórðu hesi mál flutt til komandi fund:

1. Súsanna og Jóannes fyrireika tilfar til viðgerðina av starvsinnihaldi hjá útbúgvingarleiðarum og ábyrgdarlærarum/toymislærarum á Setrinum.

2. Rúna og Randi fyrireika tilfar til viðgerðina av skipanini av lestrarráðum og akademiskum ráð á Setrinum.

Komandi fundur verður 3. februar kl. 12.00 á SRFS. Avgjørt varð eisini, at fundir skulu vera fyrrapart 16.,17. og 18. februar, kl. 8.30-12.00, har seinasta hond verður løgd á tilmælið til stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya.